**Røða til prógvhandan 22. juni 2023**

Góðu próvtakarar, avvarðandi og øll onnur, sum eru komin saman her á Vinnuháskúlanum í dag.

**Havið, tað mest náttúrliga, tað dregur okkum og lærir okkum at droyma.**

Soleiðis byrjar upplesturin í nýggjum lýsingarfilmi, sum Vinnuháskúlin nýliga hevur latið gjørt. Filmurin hevur verið vístur í bæði sjónvarpi og á sosialu miðlunum í seinastuni. Trý ungfólk , tveir menn og ein kvinna, spæla leiklutirnar í filminum, og Hans Tórgarð lesur tekstin.

Tit, sum í dag fáa handað prógv, hava traðkað tykkara barnaskógvar á hesum vøkru oyggjum her úti í Norðurhøvum. Undir ymiskum fortreytum hava tit ment tykkum. Felags fyri tykkum øll er, at tit hava gingið í ymiskum fólkaskúlum runt um í landinum, har ið tit hava nomið tykkum grundleggjandi vitan um bæði líkt og ólíkt, sum neyðugt er at duga í dagsins samfelag.

Sum Jákup Dahl so hegnisliga yrkir. **Havið sang yvir mær vøgguljóð, brimið meg ruraði í blund, síðan eg elski at ferðast á sjó til mína síðstu stund.**

Eftir loknan fólkaskúla hava tit hvør í sínum lagi antin verið til skips, gingið á miðnámi ella verið í sveinalæru fyri at lúka upptøkukrøvini til eina maritima útbúgving.

Tit eru ein ógvuliga blandaður skari av próvtakarum. Koma úr øllum herðasornum í landinum við øllum møguligum fortreytum og bakgrundum. Jarnsmiðir, elektrikarar, dekkarar o.s.v. Aldursmunurin millum tykkum er stórur, so orðaskiftini munnu mangan hava verið bæði lívlig, mennandi og spennandi.

Nú, ið tit sita her so vøkur og væl klødd í tjóðarbúna ella fagrasta skrúð, er tað helst ein barnadreymur, ið er gingin upp hjá tykkum. Tit hava nomið tykkum eina maritima leiðsluútbúgving, ið kann brúkast bæði á sjógvi og landi. Møguleikarnir eru ótømandi, bæði her heima og úti í stóru verð - tit avgera sjálvi, hvar tit velja at søkja tykkum størv.

Summi tykkara fáa helst møguleikan, at fara í altjóða sigling. Slík sigling kann geva tykkum sera gott viðføri. Hetta, at møta øðrum fólkasløgum og mentanum kann ikki undirmetast. Vit kunnu eisini fegnast um, at alsamt meira altjóða sigling í dag er á føroyskum kjøli. Umboð fyri fleiri av føroysku reiðaríunum eru stødd her í dag, so høvi er hjá tykkum at taka eitt sokallað jobprát við onkran av teimum.

Tað er bæði hugaligt og søguligt, at tað í dag eru tvær kvinnur, ið fáa handað skipsføraraprógv samstundis. Tað keðiliga við tí er, at talið av kvinnuligum lesandi á skúlanum fellir við eini helvt.

Tað sær tó kortini út til, at onkrar nýggjar kvinnuligar umsóknar eru ávegis til útbúgvingarnar á skúlanum. Í hesum sambandi kann eg nevna, at stóra danska reiðaríið Hafnia hevur kunngjørt, at umborð á fýra av teirra stóru skipum skal helvtin av manningini vera kvinnur.

Vit føroyingar eru eitt siglandi fólk og oyggjarnar eru umgirdar av havi í allar ættir. Havið og sjógvurin hava tí alstóran týdning fyri okkum sum samfelag. Føroyingar eru eisini kendir fyri at vera sera dugnalig sjófólk og hava næstan íborin evnir at ferðast og sigla runt á øllum heimsins høvum.

**Og havið seg strekti so langt, so vítt, ei mark fyri sjón víða hvar, og bárurnar skvatla so heilsandi blítt; tá rørdist mítt hjarta í mær.**

Visiónin fyri Vinnuháskúlan er, at **vit útbúgva maritimar leiðarar í heimsklassa.** Hetta setur sjálvandi sera høg krøv til okkum sum útbúgvingarstovn. Vónandi hava tit lært nógv og ment tykkum bæði fakliga og persónliga hesa tíðina, ið tit hava gingið her á skúlanum, so tit eru væl fyrireikað at taka við nýggjum og spennandi avbjóðingum. Tit hava í øllum førum lisið og lært nógvar ymiskar lærugreinar. Heilt frá grundlærugreinum til maskintøkni, elektrotøkni, siglingarfrøði, skipstøkni, virkisbúskap, leiðslu og fyriskipan o.s.fr. Eri fullvísur í, at tit eisini hava knýtt vinabond fyri lívið, meðan tit hava gingið her á skúlanum.

Sjómansskúlin fyllir 130 ár í ár. Varð upprunaliga stovnaður í 1893. Tað sigur seg sjálvt, at broytingarnar hava verið ómetaliga stórar øll hesi árini. Skipini sigldu við seglum, tá skúlin varð stovnaður, og føroyingar vóru nýliga byrjaðir við skipsfiskiskapi. Fyrstu motorarnir vórðu settir í skipini miðskeiðis í 1920-árunum og eftirfylgjandi vórðu motorpassaraútbúgvingarnar eisini settar á stovn her á skúlanum. Kann nevna, at fyrstu maskinmeistararnir, ið tóku víðkað maskinmeistaraprógv í Føroyum, fingu prógvini handað fyri 35 árum síðan, á sumri í 1988.

Skúlin hevur tí uttan iva havt ómetaliga stóran týdning fyri okkum sum siglandi tjóð og menningina av maritimu vinnunum í Føroyum.

Menningarmøguleikarnir hjá maritimu vinunum í Føroyum hava kanska ongantíð verið størri enn júst í hesum døgum nú sjóvinnan, fiskivinnan, alivinnan, ferðavinnan og aðrar avleiddar vinnur spíra og spretta bæði á sjógvi

og landi. Allar hesar vinnur eru felags um at hava allan heimin sum marknað og kundagrundarlag. Man kann ikki siga annað enn, at tað grør um gangandi fót.

Endi við byrjanini av røðuni og teksti úr nýggja lýsingarfilminum.

**Havið gevur okkum kensluna av, at vit altíð fara at vera ein partur av onkrum størri. Vinnuháskúlin, eitt hav av møguleikum.**

Takki lærarunum fyri góða og holla undirvísing og próvdómaranum fyri rættvísa próvdøming. Takki eisini Próvstovuni, próvtøkuvaktunum, umsitingini og kantinuni fyri væl frágingið arbeiði.

Ynski tykkum øllum hjartaliga til lukku við próvnum við ynskjum um alt tað besta og Guðs signing og blíðan byr í framtíðini!

**Takk fyri**